

*Tá ið landið ikki røkir sínar skyldur, mugu kommunurnar taka um endan, heldur Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, sum her er avmyndaður á eldradegnum leygardagin í práti við Niclas Akraberg Poulsen, formann í Vágs Pensjónistafelag, í miðjuni og Andrias Djurhuus úr Vági*

# Borgarstjórar í Suðuroy ósamdir um eldrarøkt

**Borgarstjórin á Tvøroyri vil ikki byggja sambýli, tí tað er ein landsuppgáva. Borgarstjórin í Vági heldur, at kommunurnar mugu sjálvar taka um endan**

ELDRADAGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Á Tvøroyri fer kommunan hvørki at byggja røktarheim, ella sambýli til tey eldru, soleiðis sum støðan nú er.

Tað gjørdi borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, púra greitt á eldradegnum á Tvøroyri leygar-dagin.

Landsfelagið hjá pensjónistinum skipaði leygardagin fyri eldradegi í Suðuroy og har vóru borgarstjórarnir í teimum báðum størstu kommunum í oynni, Vági og Tvøroyri, bjóðaðir at greiða frá eldrapolitikkinum í teirra øki.

Og tað kom týðiliga til sjóndar at borgarstjórarnir báðir, Kristin Michelsen á Tvøroyri og Jógvan Krosslá í Vági, eru grundleggjandi ósamndir um, hvønn eldrapolitikk, kommunurnar eiga at føra.

Men samstundis avdúkaðu teir báðir eisini, hvussu neyðugt tað er hjá landsmyndugleikanum at gera eitt púra greitt ábyrgdarbýti ímillum landið og kommunurnar á eldraøkinum, so at tað verður skorið út í papp, hvør hevur ábyrgdina av hvørjum.

## Onki bygt Tvøroyri

Á fundinum gjørdi Kristin Michelsen púra greitt, at tað verður hvørki røktarheim, ella sambýli til eldri bygt á Tvøroyri, sum støðan er.

– Eldrasambýli og røktarheim eru beinleiðis landsuppgávur, bæði hvat viðvíkur bygging og rakstri.

Og nú landið eigur uppgávuna, helt hann, at samgongan má gera púra greitt, hvat hon ætlar at gera, fyri at menna eldraøkið.

Hann vísti á, at undanfarna hevði sett pening av, sum kommunurnar kundu søkja um til eldraøkið.

– Men hetta var bara fyri at sleppa landinum undan at betala stórar upphæddir, tí stuðulin var bara ein lítil partur av tí, sum tað kostaði.

Kristin Michelsen legði tó dent á, at hetta skuldi ikki skiljast sum um at Tvøroyrar Kommuna var ímóti at byggja røktarheim og eldrasambúli.

– Men skal kommunan byggja, skal peningur frá landinum fylgja við.

Hann legði eisini dent á, at fyri tað um kommunan ikki fór at byggja røktarheim ella eldrasambýli nú, merkti tað heldur ikki, at kommunan onki gjørdi.

– Kommunan arbeiðir sanniliga við málinum. Vit hava projekt til eldrasambýli klárt og vit fyrireika okkum eisini at byggja røktarheim.

Hann segði eisini, at kommunan hevur sett pening av á fíggjarlógini ti leldraøkið.

– Verður eldraøkið lagt undir kommunurnar at umsita, er Tvøroyrar Kommuna væl fyrireikað at átaka sær uppgávuna. Men skulu kommunurnar hava økið, skal tað bæði vera við gjaldi og við valdi, segði hann.

– So tá ið eldraøkið verður lagt út, er kommunan til reiðar, segði hann.

Hann væntaðu tó ikki, at eldraøkið verður ikki tað fyrsta, sum verður lagt út.

Borgarstjórin vísti eisini á, at landsstýrismaðurin skal eldraøkið dagførast, fer tað at kosta 200-300 milliónir krónur

– At fáa kommunurnar at betala hetta við eini samlaðari inntøku av skatti uppá 800 milliónir, verða tað nógvar kommunur, sum aftur koma líka illa fyri, sum í nítiárunum og tað haldi eg, at øll vilja sleppa undan, sigur Kristin Michelsen.

## Mugu taka um endan

Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, er grundleggjandi ósamdur við starvsfelaga sínum á Tvøroyri.

Men hann vísti á, at veruleikin er, at landið røkir ikki sínar skyldur á hesum øki og tí noyðast kommunurnar at taka um endan.

– Tað eru okkara borgarar, tað snýr seg um. Tær kommunur, sum síggja tørvin hjá teimum eldru, mugu sostatt sjálvar byggja eldrasambýli.

– Nógvar kommunur hava bygt sambýli, hetta eru kommunur, sum hugsa um síni eldru og sum ikki vilja lata standa til, hóast landið hevur ábyrgdina.

Hann vísti á, at í Vági hevur kommunan bygt sambýli.

– Hetta er eitt tiltak, sum bæði kommunan og allir vágbingar eru ómetaliga fegnir um. Sambýlið er komið sera væl við hjá nógvum eldri fólki, men sanniliga eisini hjá teirra avvarandi, segði borgarstjórin í Vági.

– Sama, hvør hevur ábyrgdina av eldraøkinum, eri eg ómetaliga fegin um, at Vágs Kommuna hevur bygt eitt eldrasambýli til sínar eldru borgarar, segði hann.

Men í hesum sambandi vísti hann eisini á, at eisini feløg og einstaklingar í Vági hava gjørt eitt øgiligt arbeiði fyri at útvega pening til sambýli við bingospølum og innsavning av ymsum slagi.

## Verður best røkt hjá kommununum

Jógvan Krosslá vísti eisini á, at í Suðuroy eru útvið 60 pláss á røktarheimum og á teimum sambýlum, sum eru.

Hann metti, at tørvur var á umleið 50 plássum afturat beint nú.

– Tað fer at kosta 200-250 milliónir at byggja eldraøkið í øllum landinum út fyri at nøkta tørvin. Samstundis fer tað at kosta 150-200 milliónir at reka hesi sambýli, røktarheim og ellisheim í øllum landinum, tá ið tørvurin er nøktaður.

– Hetta eru stór tøl, men tað er neyðugt at gera eitt ordiligt hol í sjógvin nú, fyri at koma uppundan, tí so verður léttari at fylgja við tørvinum so hvørt

Jógvan Krosslá, sum eisini er formaður í Kommunusamskipan Føroya, ivaðist ikki í, at tað var rætt at leggja eldraøkið út til kommunurnar at umsita.

– Tað er best, at málið verður lagt undir kommunurnar at umsita, tí tá er umsitingin nærri borgarunum og tað er léttari hjá borgarunum at gera vart við síni krøv.

Men hann helt, at sjálvsagt skal landið seta treytir og krøv til kommunurnar á hesum øki.

Hann segði eisini, at sama, hvør umisitur økið, er tað skattaborgarin, sum skal betala.

– Liggur økið hjá landinum, vera tað allir skattaborgararnir, sum koma at betala, eisini teir, sum lítla ella onga eldrarøkt fáa. Verður økið undir kommununum, verða teir borgarar, sum fáa eina tænastu frá kommununi, sum betala til at nøkta sín egna tørv.

Hann sigur, at verður økið lagt undir kommunurnar, kann fíggingin útvegast á tann hátt, at landsskatturin lækkar eini 3%, so at kommunurnar kunnu hækka sín skatt tilsvarandi, sigur Jógvan Krosslá.

Í øllum er tað neyðugt, at landið og kommunurnar semjast um eina skipan so at verulig ferð kann fáast á at útbyggja eldraøkið.



# Tey eldru skulu hava tilboð um at arbeiða niðursetta tíð

**– Pensjónistar skulu síggjast, sum ein fjølbroyttur bólkur og eldrapolitikkur er ikki bara ein spurningur um heimarøkt og røktarheim, segði løgmaður á eldradegnum í Trongisvági leygardagin**

ELDRADAGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Um eini fýra ella fimm ár, fer ein stakur pensjónistur at fáa 10.000 krónur í pensjón og eini hjún fara at fáa 16.000 krónur. Harafturat eru tað fleiri ,sum fáa aðrar, privatar pensjónir, fortaldi Jóannes Eidesgaard, løgmaður, teimum, sum vóru møtt á eldradegnum í Trongisvági leygardagin*

– Eldrapolitikkur skal taka útgangsstøði í pensjónistunum sjálvum. Og pensjónistar er ein fjølbroyttur aldursbólkur, akkurát sum allir aðrir aldursbólkar.

Tað segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður við teir gott 100 pensjónistarnar, sum vóru møttir í skúlahøllini í skúlanum í Trongisvági leygardagin.

Landsfelagið hjá pensjónistunum skipar einaferð um ári fyri einum tiltakið, tey nevna eldradagur. Og í ár var eldradagurin í Suðuroy leygardagin.

Á eldradegnum fekk løgmaður høvi til at greiða frá, hvønn eldrapolitikk, hendan samgongan hevur sett sær fyri at reka.

– Bæði vit politikarar, og samfelagið sum heild, hava ofta hug at skera yvir ein kamb. Og tað ger tað so nógv léttari at hava eina støðu, um øll tey gomlu verða bólkað eins og um tey øll vóru ein stórur, gráur, einsamallur og hugtungur bólkur, sum ikki hevur áræði og áhuga fyri lívinum, sum keðir seg, og sum ikki dugur at stytta sær stundir.

– Men allir pensjónistar eru ikki eins og tí er tað avgerandi, at vit síggja pensjónistarnar sum ein fjølbroyttan bólk, júst sum aðrir aldursbólkar, segði Løgmaður.

Hann legði dent á, at eldrapolitikkur er ikki bara ein spurningur um heimarøkt og røktarheim.

– Men eldrapolitikkurin eigur at taka útgangsstøði í pensionistunum sjálvum. Og høvuðsmálið má vera, at fólk skulu hava eina virkna tilveru í heimligum umhvørvi.

## Arbeiða niðursetta arbeiðstíð

Jóannes Eidesgaard legði dent á, at eitt, sum hann hugsar um, tá ið hann tosar um eina virkna tilveru, er, at frágongdin frá arbeiðsmarknaðinum verður so smidlig sum gjørligt.

– Vit hava brúk fyri einum seniorpolitikki, har frágongdin frá arbeiðsmarknaðinum verður tengd at, hvussu umstøðurnar hjá tí einstak eru. Tað merkir, at tú kanst fara yvir til eitt nú niðursetta arbeiðstíð bæði fyri og eftir 67, alt eftir hvussu umstøðurnar hjá tær eru.

Hann segði, at hetta vil so eisini gera, at arbeiðspláss kunnu læra av teimum drúgvu royndum, sum eitt langt og virkið arbeiðslív gevur.

Løgmaður legði eisini dent á, at sjálvandi eigur ein góður eldrapolitikkur eisini taka hond um tey av okkara eldru, sum ikki longur orka sjálvi.

– Tey skulu hava tey tilboð, sum eru neyðug fyri at tey kunnu verða verandi heima sum longst.

– Men tá ið tey ikki kunnu kunnu vera heima longri, skulu tey fáa tilboð um eldrasambýli og røktarheimspláss.

## Pensjónin hækkast munandi

Jóannes Eidesgaard segði, at onkuntíð verður sagt, at um nøkur ár kemur ein eldrabylgja, sum hóttir við at taka samfelagið av fótm.

– Hetta er litið virðilig tala. Tey eldru skulu tvørturímóti uppfatast sum eitt aktiv og ikki ein hóttan. Einasta hóttanin er politikarar, sum ikki vilja ella skilja rætta samanhangin.

Hann segði, at ein annar týdningarmikil partur av eldrapolitikkinum er pensjónin og í hesum sambandi hevur samgongan gjørt av at gera eitt rættiligt framtak. Eitt framtak. – Samgongan hevur avtalað, at umframt sjálva fólkapensjónina, verður samhaldsfasti eftirlønargrunnurin munandi styrktur.

Sostatt fær pensjónin í framtíðini trý bein at standa á: Fólkapensjónin, samhaldafasti eftirlønargrunnurin og so tær fakfelagspensjónir, sum fleiri og fleiri fáa sær.

– Tilsamans fare hesi trý at lyfta pensjónina upp á eitt virðiligt og nøktandi støði, segði løgmaður.

Hann segði, at tey tiltøk, sum samgongan hevur sett sær fyri, er at trýfaldað inngjaldið í samhaldsfasta eftirlønargrunnin, so at arbeiðsgevarar og løntakarar hereftir skulu betala hvør síni 3% av lønini í grunnin.

Tað fer at gera, at um eini fýra til fimm ár, fer ein stakur pensjónistur at fáa einar 10.000 krónur í eftirløn um mánaðin og eini hjún fara at fáa 16.000 krónur.

## Miðsavning neyðug

Í røðu síni fyri pensjónistunum kom Løgmaður eisini inn á spurningin um at leggja eldraøkið út til kommunurnar at umsita.

– Onkur vil vera við, at tað er neyðugt, at avgerðirnar verða tiknar so nær borgarunum sum gjørligt, og tað er ivaleyst eisini rætt. Men álvaratos, hvussu stórt er okkara land, spurdi Løgmaður.

Hann spurdi í sama viðfagni, sum vit ikki yvirmettu støddina á landinum eitt sindur, tá ið vit siga, at landsmyndugleikarnir eru ov langt burtur?

Sjálvur er hann sannførdur um, at ein ávís miðsavning er neyðug fyri at forða fyri, at vit ikki fáa ymiskt tænastustøði í eldrapolitikkinum, alt eftir hvussu kommurnar gera av at raðfesta økið.

## Skulu vera sjónligari

Pensiónistafeløgini hava fingið stóra undirtøku kring landið og Jóannes Eidesgaard helt, at tey hava prógvað, at tey liva upp til endamálið.

– Nógv av feløgunum eru sera virkin og syrgja fyri, at limirnir ikki sleppa at fella í fátt, við at halda teimum virknum við ymsum tiltøkum.

Hann helt eisini ,at pensjónistafeløgini hava stóran týdning fyri ein góðan eldrapolitikk.

– Nú skal eg ikki siga, at bingo ella ein ferð uttanlands eru einasta eydnan í aldurdóminum.

Sjálvur vildi Jòannes Eidesgaard fegin, at feløgini at feløgini gjørdu sína ávirkan munandi meira galdandi í samfelagsspurningum.

– Tað, besta hevði verið um tey eldru vóru sjónligari í vanliga kjakinum, ikki bert um eldrapolitikk, men um øll vanlig samfelagslig mál.

Hann segði, at tey eldru hava lívsroyndirnar og ávirkan frá teimum hevði verið ein tiltrongdur partur av samfelagskjakinum.

– Menniskju trívast best saman við øðrum menniskjum, og hetta skapar røtt lívsvirði. – Men lívsvirði er eisini tað, at fyriskipa sjálvi í gerandisdegnum og at hava eina greiða meining um samfelags viðurskifti.

– Tey gomlu hava atkvøðurætt alt lívið. Hesar atkvøður leggja eisini grundarlagið undir politiska virkseminum.

– Sostatt mugu tey gomlu ikki flýggja undan samfelagstrupulleikunum, men eiga sum medábyrgdarar at luttaka í kjakinum, segði Jóannes Eidesgaard.